# Teir somu sleppa at royna aftur

**Býráðið í Havn hevur samtykt at bjóða ætlaðu dagstovnarnar á Argjum og í Hoyvík út av nýggjum, men bara til teir somu, sum bjóðaðu fyrru ferðina**

FLØKT BYGGIMÁL
*Áki Bertholdsen*

Nú skal arbeiðið at byggja dagstovn á Argjum og í Hoyvik, bjóðast út av nýggjum.

Tað samtykti Tórshavnar Býráð hóskvøldið.

Men stovnarnir skulu bara bjóðast út til teir somu, sum bjóðaðu fyrru ferðina, tá ið málið datt niðurfyri, tí fløkja kom í.

Tað var m.a. ein trupulleiki viðvíkjandi mvg, sum tók seg upp, tí teir, sum lótu inn tilboð, høvdu ikki til fulnar roknað við meirvirðisgjaldinum.

Nú, málið aftur var fyri í Mentamálanevndini, mælti meirilutin, Heðin Mortensen, Beate L. Samuelsen og Bjarti Mohr, Býráðnum til at útbjóðingin verður avlýst, og arbeiðið verður boðið út av nýggjum í innbodnaðari útbjóðing í totalari arbeiðstøku til teir somu, sum hava latið tilboð inn.

Men tey mæltu eisini til, at útbjóðingartilfarið varð tillagað, so at tað nú verður Kommunan, sum kemur at standa sum byggiharri, at kommunan kann taka av einum ella tveimum stovnum frá sama tilboðsgevara, at vektingin verður broytt, soleiðis at kostnaðurin 40%, arkitekturur og innrætting 40% og tilfarsval 20%, at tilboðini skulu verða inni 3 vikur, eftir at útbjóðingartilfarið verður sent út at byggingin av báðum stovnunum skal verða liðug 1. november 2002.

At døma innkomnu tilboðini skuldi ein nevnd setast við við umboðum úr umsitingini hjá Býráðnm og arkitektafelag Føroya.

Minnilutin í nevndini, Jógvan Arge og Torfinn stúrdu fyri, at fløkja aftur kemur í málið og tí mæltu teir til, at Býráðið tryggjaði sum mest gjøgnumskygni í máli og tí mæltu teir til, at teir báðir barnagarðarnar vórðu bodnir út í almennari licitatión eftir tekningum, sum Býráðið skuldi útvega.

Men tá avtornaði, var tað upskotið hjá meirilutanum, sum vann frama, hóast minnilutin í býráðnum ikki atkvøddi fyri tí.

# Føroya Sparikassi lækkar rentuna

**Føroya Sparikassi hevur lækkað rentuna 0,25- 0,50 prosent**

RENTULÆKKING
*Áki Bertholdsen*

Eins og aðrir fíggingarstovnar, hevur eisini Føroya Sparikassi lækkað rentuna. rentulækkingin fekk gildið 12. november.

Tá lækkaði rentan fyri ymisk lán ímillum 0,25 og 0,5 prosent.

Sparikassin sigur, at lækkingin er eitt úrslit av, at danska rentustøðið lækkaði nakrar dagar frammanundan, sigur Sparikassin í tíðindaskrivi.

Eftir rentulækkingini er rentan á bústaðarlánum hendan:

1. veðrættur:
5,0% -5,25% um árið.

2. veðrættur:
7,75% - 8,50% um árið.

Rentan á billáni í Føroya Sparikassa er lækkað 0,25% og er nú ímillum 5,75% og 7,75% um árið, alt eftir, hvussu stórt útgjaldið er um aðrar trygdir eru.




*Marknagilsvegurin skal nú gerast heilt liðugur*

# Marknagilsvegurin skal nú gerast liðugur

**Býráðið hevur nú játtað slakar 3,5 milliónir til at gera Marknagilsvegin heilt lidnan**

VEGARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*

Nú skal marknagilsvegurin í Havn gerast heilt liðugur.

À býráðsfundi hóskvøldið samtykti Tórshavnar Býráð at játta slakar 3,3 milliónir til at gera vbegin lidnan. peningurin verður tikin av útbyggingarkvotuni fyri í ár.

Arbeitt hevur verið uppá hann í fleiri ár, men nú líður so væl ímóti endanum, at tíðin er komin til at fáa tað seinasta frá hondini.

Talan er um trý arbeiði, sum nú skulu gerast.

À fundinum hódskvøldið játtaði býráðið 827.000 krónur til at gera grótlaðingar, sum eru eftir.

Harumframt hevur býráðið játtað 1,3 millión afturat til at gera privatar urtagarðar, tún, grótlaðingar og til at gera innkoyringar aftur fyri, umframt til at flyta bilhús fyri o.s.fr.

Býráðið samtykti at taka av einum tilboði frá Guttesen & Staksberg uppá slakar 3,4 millión fyri at gera Marknagilsvegin lidnan. Somuleiðis varð samtykt at játta 1,3 millión, sum restaði í.

Farast skal undir arbeiðið beinanvegin, so at tað kann verða liðugt um eitt hálvt ár.

Og at enda hevur Býráðið játtað 1,2 millión til til at gera kantsteinsarbeiði og gongubreytir liðugt fyri.

Men áðrenn farið verður undir arbeiðið, skal verkætlan leggjast fyri teknisku nevndina til avgeiðslu.

# Læknamiðstøðin í Gundadali gerast liðugt

**Býráðið í Havn hevøur játtað pening til at gera annað byggistig av læknamiðstøðini í Havn liðugt, so at lækni kann flyta inn**

LÆKNAMIÐSTØÐ
*Áki Bertholdsen*

Nú skal annað byggistig av læknamiðstøðini í Gundadali gerast liðugt.

Tað samtykti Tórshavnar Býráð hóskvøldið.

Býráðið samtykti at játta tilsamans 1,49 millión til at gera Læknamiðstøðina lidna fyri og tann peningurin skal brúkast til innbúgv og útgerð.



*Býráðið hevur samtykt at brúka 2.490 milliónir uppá at gera læknamiðstøðina í Gundadali lidna*

Sambært kostnaðaryvirlitinum, skulu 600.000 krónur brúkast til innbúgv og aðrar 600.000 til útgerð og tól til læknan

Tær seinastu 290.000 krónurnar, er prís- og lønarhækkingar, sum eru komnar, síðani kostnaðarmetingin varð gjørd.



# Sera ósakligar samráðingar

**– Tá ið mótparturin fer at umrokna og eftirrokna ymiskt, sum var avgreitt og semja var um, samstundis sum tey komu við nýggjum prinsippum og tølum, var eingin annar útvegur enn at fara í verkfall, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag**

VERKFALL
*Turið Kjølbro*



*- Vit kunnu ikki vera annað enn ótrygg við mótpartin, tá ið hann leypur frá avtalum, sum semingsfólkini hava gjørt og báðir partar hava undirskrivað, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag*

Eftir samráðingarslitið týsnáttina skuldseta Fíggjarmálastýrið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag mótpartin Føroya Pedagogfelag at leypa frá gjørdari avtalu. Føroya Pedagogfelag hinvegin sigur seg ikki at hava lopið frá nakrari avtalu og skírir mótpartin sera óseriøsan. Eftir at semingsfólkini Gloria Kalsø og Jákup í Gerðinum vóru komin upp í leikin fyrst í hesum mánaðinum, komu partarnir ásamt um, at tey skuldu arbeiða við at gera eina nýggja lønartalvu fyri allar limirnar hjá Føroya Pedagogfelag, og síðani fáa restina av sáttmálakrøvunum uppá pláss. Arbeiðið skuldi verða liðugt seinasta hósdag 15. november, tá ið sáttmálin skuldi undirskrivast.

– Vit hittust til ein arbeiðsfund, men annars hevur mótparturin hvørki verið at sæð ella til at hitta hóast vit óteljandi ferðir hava roynt at fingið fatur á teimum. Sostatt eru ymisku sáttmálaviðurskiftini als ikki arbeidd ígjøgnum, sum vit høvdu roknað við. Hetta er sera óseriøst, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag heldur ikki, at mótparturin kann ákæra teirra felag at hava lopið frá nakrari avtalu, tá ið sáttmálakrøvini ongantíð eru avtalað.

– Vit høvdu gjørt eina avtalu út frá tí, vit vóru samd um. Tað, sum restaði í – og tað vóru nógv viðurskifti –, skuldi avgreiðast til tann 15. nov. Men av tí, at mótparturin als ikki hevur verið at fingið fatur á, kundu vit ikki gera annað enn at taka hesi krøvini við til samráðingarnar til endast, sigur Carita Björklund.

Undir samráðingunum vórðu partarnir vorðnir samdir um nærum allan limabólkin og høvdu gjørt eina lønartalvu har útfrá, sigur forkvinnan í Føroya Pedagogfelag.

– Einasta, sum restaði í, var uppskotið hjá okkum um, at dagrøktarleiðarar verða løntir á jøvnum føti við dagstovnaleiðarar. Tá ið mótparturin so fór at eftirrokna, komu teir til, at lønarhækkingin so fór upp um tey 12 prosentini, sum var karmurin. Talan er um 25 dagrøktarleiðarar, og tá ið vit tosa um meiri enn 1000 limir í Pedagogfelagnum, loyvi eg mær at ivast í, um lønarhækkingin til hesi 25 koppa øllum roknistykkinum.

– Tá ið mótparturin fer at umrokna og eftirrokna ymiskt, sum var avgreitt og semja var um, samstundis sum tey komu við nýggjum prinsippum og tølum, var eingin annar útvegur enn at fara í verkfall.

## Ímóti lønartalvu

At gera eina nýggja lønartalvu fyri allar limirnar hjá Føroya Pedagogfelag, hevur verið eitt av stóru málunum, sum Føroya Pedagogfelag hevur arbeitt við. Málið er at gera ein einfaldari sáttmála við eini lønartalvu ístaðin fyri fýra, sum nú er. Í lønartalvuna skulu so allir limirnir setast av nýggjum og har í kemur lønarhækkingin.

– Hóast báðir partar hava skrivað undir uppá, at vit skulu hava eina lønartalvu, arbeiðir mótparturin ímóti, at vit fáa eina slíka. Tað er eingin vilji til, at nøkur semja verður gjørd. Vit skutu upp, at okkara limir fingu eina lønarhækking uppá 5 prosent fram til 1. mars komandi ár og at vit tá taka eina nýggja lønartalvu í nýtslu, sum vit sjálvandi skulu vera samd um. Men heldur ikki tað vil mótparturin. Vit kunnu ikki vera annað enn ótrygg við mótpartin, tá ið hann enn tá leypur frá avtalum, sum semingsfólkini hava gjørt og báðir partar hava undirskrivað, eisini landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sigur Carita Björklund.

Skjótt eru níggju mánaðir gingnir síðani sáttmálin hjá Føroya Pedagogfelag fór úr gildi.

– Okkara limir eru sera ónøgdir við ikki at hava fingið nakran sáttmála enn. Vit hava følt ein mótvilja frá byrjan til enda, sum helst botnar í tí sum hendi í vár, tá ið ógreitt var, hvør okkara samráðingarpartur var og vit máttu í verkfall.

Verkfallið merkir, at umleið 900 limir í Føroya Pedagogfelag ikki fóru til arbeiðis týsdagin í vøggustovum, barnagørðum, frítíðarskúlum og serstovnum kring landið. Í tíðindaskrivi eftir slitið týsnáttina siga Fíggjarmálastýrið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Kommunala Arbeiðagevarafelag, at tey vóna, at Føroya Pedagogfelag skjótt kemur til samráðingarborðið aftur. Eftir øllum at døma ein lítil innbjóðing.

# Hugleiðingar um eina heimsferð




**– Ein ferð kring knøttin snýr seg um aldri at geva skarvin yvir, og at læra at tálma óttan, sum av og á kemur undan kavi, sigur Erik Torjusen, heimssiglari og høvundur í bókini En saga i blått**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*



*Fyri tveimum árum síðani gav Durita Holm út bókina Ferðin um bláu gongustjørnina. Nú hevur maður hennara skrivað bókina En saga i blått*

Á forlagnum Freyja hevur heimssiglarin Erik Torjusen givið út bókina En saga i blått. Ferðin hjá Erik Torjusen byrjaði á sumri í 1995, tá ið hann sjálvur annar setti kósina út í heim við 28 fót stóra seglbátinum Medusa. Sigliroyndir teirra vóru sera avmarkaðar, men hugurin, eldhugurin og dirvið tess størri.

Í bókini greiðir hann frá, at einki gekk sum tað skuldi. Eina myrka nátt í Karibia fer báturin til botns. Stutt eftir fáa teir fatur á eini aðrari skútu, sum teir síðani halda ferðina fram við út í Kyrrahavið. Har hittir Erik Torjusen ungu føroysku kvinnuna, Duritu Holm, sum ikki er minni djørv og eldhugað á síni ferð um bláu gongustjørnina við Sølku Vølku. Í Avstralia fara vinirnir hvør til sítt eftir eina sera dramatiska hending, og heilt óvæntað verður hald lagt á skútuna í Brisbane. Erik Torjusen heldur leiðina fram kring knøttin umborð á Sølku Vølku saman við Duritu Holm, sum tá er við barn.

Í fororðunum til bókina En saga i blått sigur Erik Torjusen, at bókin á ongan hátt er ein tradisjónell bók um eina ferð kring knøttin. En saga i blått fer djypri, og roynir í størri mun at lýsa tankar og hugleiðingar sum ein heimssiglari ger sær. Bókin lýsir umhvørvið, samanhaldið og innara lívið hjá teimum, sum sigla á høvunum í smáum, viðkvomum bátum. Hann setur spurnartekin við, hví fólk yvirhøvur fara eina slíka ferð, hvørjum leita tey eftir, hvat uppliva tey í grundini, og hvat ger ferðin við hesi fólkini.

– At gera ein dreym til veruleika er deiligt, men ikki heilt vandaleyst. Vandarnir eru nógvir. Tú kanst eitt nú uppliva at fáa ynski tíni eftirlíkað, nakað sum í sjálvum sær kann verða ein skelkur og harvið ringt at handfara. Vandin kann eisini vera, at tú situr eftir við brostnum dreymum, og tað er heldur ikki ein góð kensla. Eisini kanst tú koma út fyri, at dreymurin verður til eina marru...

– Ein ferð kring knøttin snýr seg um aldri at geva skarvin yvir hóast mótgang, sum øll koma út fyri. Tað ræður um at satsa, og tora at kasta seg út á 70000 favna dýpi, sum Søren Kierkegaard sigur. Tað ræður um at føla hjartað banka hart, føla adreanalinið súsa ígjøgnum æðrarnar og læra at tálma óttan og ræðsluna, sum av og á koma undan kavi, sigur hann.

Erik Torjusen, sum er føddur í 1963, er frá Stavanger. Hann hevur brúkt meginpartin av sínum lívi til at leita upp fjarskotin lond og fjarar mentanir. Størsta partin av sínum lívi hevur hann fjaðkað í Mið- og Suðuramerika, Asia, Miðeystri og Norðurafrika.

Høvundurin er útbúgvin cand. mag frá lærda háskúlanum í Bergen og hevur undirvíst í máli og samfelagsfrøði í miðnámsskúlum.

Síðani ferðina kring knøttin hevur hann arbeitt við sjónvarpsrøð um ferðina og skrivað um ferðina. Somuleiðis lesur hann á lærda háskúlanum í Oslo.

En saga i blått fæst í bókabúðunum.